


**Nr. 9** **24. apríl 2016** **76. árg.**

# Elskar tú meg?

*"Símun Jóhannesarson, elskar tú meg?" Jóh. 21,15.*

Fyrstu ferð, Jesus og Pætur tosa saman eftir uppreisnina, setir Jesus Pæturi ein og sama spurning tríggjar ferðir: "Elskar tú meg?"

Hvat skuldi Pætur svara? Tí sjálvur hevði hann nakrar dagar frammanundan tríggjar ferðir avnoktað Jesus. Tá ið alt tað kenslusama verður tikið burtur úr orðinum "elska," gerst tað eitt forpliktandi orð, og tí víkja vit uttanum, tá ið vit standa yvir fyri spurninginum, og kenna okkum sek.

"Tú veitst, at eg eri góður við teg," svaraði Pætur. Minkaði hann harvið um væntanina? Nei, men hann sá støðuna úr einum øðrum sjónarhorni. Hann hevði onki at geva, og hann sló seg sjálvan frammaná, um hann svaraði spurninginum við einum ja.

"Eg eri góður við teg," segði hann, og tað tordi hann at siga, tí at hjá Jesusi Kristi hevði hann funnið nakað, sum hann onga aðrastaðni fann, og sum hann ikki kundi umvera.

Onkuntíð hava vit sungið: "Teg vil eg elska, tú mín styrki," og vit meintu kanska tað, vit sungu. Men vit skiltu, at veruleikin ikki var í samsvar við orðini. Hvat skulu vit siga, um Jesus nevnir okkum við navni og spyr: "Elskar tú meg?" Ikki er lætt at vera ærligur. Í fyrsta brævi sínum skrivar Jóhannes um Gud, sum er kærleiki: "Og vit hava ásannað og trúð tí kærleika, sum Gud hevur til okkara," (4,16) og hann heldur fram:"Vit elska, tí at hann elskaði okkum fyrst." Her skal ikki minkast um virðið í orðinum. Tað skal verða standandi, og í hesum

“**tí**” lata vit akker okkara falla. **Tí hann elskaði okkum fyrst**. (4,19) Og so royna vit at geva eitt lyfti. Vit siga sum Pætur: “Tú veitst, at eg eri góður við teg.” “Hvønn skulu vit fara til? Tú hevur orð hins æviga lívs.”

*Um nakar nú meg spyrja vil*
*um mína grund til frið,*
*um onki annað hoyrir til,*
*sum ein má hava við,*
*enn Jesu blóð og eina tað,*
*sum fleyt á Golgata hin dag,*
*tá svari eg: “Mín grund er góð,*
*mín grund er Jesu blóð!”*

# Summi spotta

Á missiónsvikuni greiddi ein maður frá, at hann plagdi at vitna fyri sínum arbeiðsfeløgum. Summi halda, at tað er at fara ov vítt; men Bíblian biður okkum vera brennandi í andanum (Róm. 12,11), og Jesus ávarar okkum og sigur, at um vit eru flógv, lunkað, so vil hann spýggja okkum út úr munni sínum. (Opb. 3,16).

Einaferð arbeiddu hann og ein annar saman. Hann segði okkurt um Jesus við mannin; men hesin flenti bara so hjartaliga. Hatta trúði hann einki uppá, segði hann. Men á Nóa døgum flentu fólk eisini, endin var kortini, at flóðin mikla kom, og tey druknaðu øll. Tá flentu tey helst ikki.

Hin maðurin arbeiddi í einari maskinu, meðan tann trúgvandi gekk frammanfyri og peikaði honum á steinarnar, ið hann skuldi taka. Trúgvandi maðurin var í gulum oljuklæðum og vendi bakið til hin. Jakkin hevði hettu, og niðan fyri hana hevði hann skrivað J L, so hann kendi sín arbeiðsjakka aftur, hetta vóru forbókstavirnir í navni hansara.

Brádliga bankar maðurin í maskinuna upp á rútin. Hin snarar sær á og fer yvir og letur hurðina upp á maskinuni. Har situr maðurin og er øskugráur í andlitinum. “Hvat bagir tær?” spyr trúgvandi maðurin.

“Tað stóð við lýsandi bókstøvum eftir rygginum á tær: JESU LAMB,” svarar hin.

“Ja, nú hevur tú, ið hvussu, er fingið prógv fyri, at Jesus livir, og nú er tað upp til tín, hvat ið tú gert við ta vitanina,” svaraði tann trúgvandi maðurin.

“Sí, Guds lambið, sum ber synd heimsins.” (Jesus ber burtur synd heimsins) Jóh. 1,29. Hann er ofraður fyri tínar syndir, hvat gert tú við tað?

*Effie Campbell.*

# Av sonnum fræls

Um allan heim stríðast menniskju fyri at fáa frælsi. Men við tíðini verða støðugt fleiri lógir gjørdar, sum avmarka hetta góða frælsið. Hví? Tí alt ov mong stríðast fyri frælsi til at gera tað, tey ikki áttu at gjørt. Tá kann frælsið føra bindingar við sær mótvegis okkum sjálvum og gerast ein plága fyri onnur, og alt gerst verri enn vit væntaðu.

Frælsi er ikki bara rætturin at velja. Frælsi er eisini, at vit mugu liva við fylgjunum av okkara fríu valum. Frælsið kann lættliga misnýtast, so vit kunnu koma út í eina vanlukkuliga støðu.

Veruligt frælsi er ikki at sleppa undan øllum skyldum ella undan allari ábyrgd. Frælsi er at finna sonnu akkersgrundina í lívinum og haðani at kunna seg um leiðina fram.

Jesus Kristus tosaði nógv um frælsi Einaferð skar hann tað út í papp fyri teimum, sum lýddu á: *“Um tí sonurin fríar tykkum,tá skulu tit verða av sonnum frælsir.” (Jóh.8,36).*

# Kærleikin

Ofta líða hjúnaløg undir øðrum enn teimum stóru tingunum, so sum ótrúskapi, misbrúki og kulda. Hjúnaløg kunnu eisini slitna av øðrum grundum, so sum atfinningum og vantandi virðing, og av tí at hjúnafelagarnir taka hvørt annað fyri givið. Um tit alla tíðina høgga í hvørt annað, koma tit ongantíð at uppliva ta djúpu eydnuna í hjúnalagnum, sum Gud hevur ætlað tykkum. Menniskju broytast bara, um tey kenna seg vird og skilt. Bíblian sigur: “Kærleikin er langmóðigur og góðviljaður (t.e. mildur).” 1. Kor. 13,4. Tað, sum ikki verður vunnið við kærleika, verður als ikki vunnið.

*e.c. ums.*

# Hvørjum vilt tú tæna?

*Ongin kann tæna tveimum harrum. Matt. 6,24.*

Í Guds ríki er ongin uttanveltað støða – har er tað soleiðis: antin – ella! Fyri ella ímóti! Har er ongin millumstøða. Gud ella Djevulin.

Í hesum førum skuldi verið lætt at valt – hugsa bara um hitt vanliga valið, sum vit fara á, tá ið vit skulu velja millum borgarligar tænastur, hvørjar tær so eru.

Hjá Gudi fáa vit frælsi at gera Guds vilja – men ikki frælsi at fremja okkara egna vilja, tí hann er ikki frælsi, men trældómur. Hjá hinum ónda sleppa vit at gera eftir okkara egna vilja og lystum, men ongantíð í frælsi at gera Guds vilja, hitt góða og væltoknaða.

Hjá Gudi er ein ævig náðiløn – hjá hinum ónda bíðar glatanarlønin. Hjá Gudi læra vit alt, sum er gott og reint, tað, sum er tokkaligt – hjá hinum ónda læra vit alt tað, sum fær okkum at skammast. Jú, víst læra vit nógv í hesum báðum førunum – men munurin er ógvuliga stórur!

Og húsbóndin sjálvur? Annar er hann, sum læt son sín doyggja fyri at bjarga okkum undan deyða og dómi. – Hin er hann, sum líka frá fyrndini fløkti menniskjuna upp í sín ónda uppreistur móti Gudi.

Heldur tú, at tað er torført at velja í dag?

*t.* týddi.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 24.apríl. | Tekstur: | Matt.26,69-75 og Jóh.21,15-19; | bíbliuorð: | Sálm.103,12 |
| 1.mai. | Tekstur: | Luk.18,9-14; | bíbliuorð: | Matt.7,7 |
| 8.mai. | Tekstur: | Áps.1,6-11; | bíbliuorð: | Áps.1,8b |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




***Nr. 10*** ***8. mai 2016*** ***76. árg.***

# Tað størsta í lívinum

*Harrin lati andlit sítt lýsa yvir teg og veri tær náðigur.*
*4. Mós. 6,25.*

“Nú sigi eg tygum farvæl og takk og ynski, at tygum og tygara mega finna tað største í lívinum!” segði hann og bukkaði og fór. Hann hevði sagt frá lívi sínum, sum hevði verið merkt av ógvisligum tilburðum. Hann hoyrdi til teirra, sum livdu á lívsins skuggasíðu, og tú fekst samkenslu við honum. Nú fór hann, men ynski hansara setti nógvar spurningar í sinninum. “So ynski eg tygum og tygara tað størsta í lívinum,” segði hann. Hvat sipaði hann til? Eg veit tað ikki. Mundi hann sjálvur vita tað?

Hvat er tað størsta í lívinum? Tað størsta, sum Gud kann geva, er ikki, at tú gerst kendur og stórur, men at tú gerst eitt satt menniskja. Ja, og hvat er so tað...... at gerast eitt satt menniskja? Tað er at finna fram til sonnu støðu okkara sum skuldarar yvir fyri tí Gudi, ið skapaði okkum, og at sleppa at liva í kærleikans gerningum.

Tað størsta í lívinum er at verða endurreistur á grundvøllinum, sum eitur fyrigeving syndanna, so vit tora “at syngja Gudi lov fyri ljósan dag,” hóast lívið er órættvíst, og syndirnar eru mangar, og hóast allar tær týnandi kreftirnar kring okkum. Tað størsta í lívinum er Kristus og alt, sum liggur í navni hansara. Tað størsta er, at Gud boðar okkum, at hann fyri Kristi skuld “letur andlit sítt lýsa yvir okkum og er okkum náðigur,” at “náði hansara er nýggj á hvørjum morgni, og at kærleiki hansara varir um ævir.” Tað størsta í lívinum er at sleppa at

hvíla í trúnni á syndanna fyrigeving, uppreisn likamsins og ævigt lív. Tað størsta í lívinum er friðurin, mátturin og vónin, ið tann fær, sum gevur seg yvir til Guds og heldur út til endan.

Hann hevði rætt, hann, sum hevði livað á lívsins skuggasíðu; tað, sum um ræður, er at finna tað størsta í lívinum, og nú mást tú spyrja teg sjálvan, um tú hevur funnið tað.

*Fest títt eyga á Jesus,*
*hygg inn í hans andlit so kært.*
*Og øll heimsins gleði tá fánar burt*
*í tí náði og dýrd, ið tú sært.*

# Harrin skal turka tárini

*Harrin drottin skal turka tárini av hvørjum andliti og taka burtur vanvirðing fólks síns um alla jørðina, so satt sum Harrin hevur talað.*

*Jes. 25,8.*

Ein skuldi hildið, at hetta átti at staðið í seinastu bókini í Bíbliuni, har vit lesa um himmalsins dýrd. Í sínum fullkomna ríki skal Gud turka hvørt tár av eygum okkara, og har skal hvørki vera sorg ella pína ella deyði. Men hesi orðini standa á heilt øðrum staði. Hetta stendur hjá profetinum Jesaja, sum mong hundrað ár fyri Jesu føðing boðaði bæði dóm og frelsu fyri fólkið, sum var endað í útlegd í Bábylon.

Har í útlegdini og ófrælsinum runnu mong tárini. Tey, sum vóru rikin í útlegd, rópaðu til Guds um at fría tey og lova teimum heim aftur í landið, sum hann fyrr hevði leitt tey inní. Við tárum longdist teimum heim aftur í lovaða landið. Tað var í hesi støðuni, at profeturin kom við sínum uggandi orðum. Hann talaði um eina framtíð, har Harrin fór at leggja uppí og taka burtur deyðan - høvuðsorsøkina til tár ígjøgnum allar tíðir.

Men Harrin fer ikki bara at vinna á deyðanum. Hann fer at steðga grátinum og turka tárini av hvørjum andliti. Við Jesu uppreisn vísti Gud, hvat hann hugsaði um við hesum uggandi orðunum til fókið í gamla sáttmálanum. Tað merkir ikki, at øll tár eru burturi. Vit liva enn í deyðans heimi, har menniskju enn møta slíkum, sum fær tár at renna. Kortini eru hesi gomlu profetaorðini í ferð við at ganga út, eisini í hesum sambandi.

Mong menniskju kunnu vitna, at tá ið tárini koma, er Harrans hond har og turkar tey burtur. Harvið styrknar væntanin til tann dagin, tá ið Harrin um ævir fer at turka øll tárini burtur av andlitinum hjá fólki sínum.

## Harrans navn er eitt sterkt torn

*Harrans navn er eitt sterkt torn, hagar flýggjar hin rættvísi og er vardur.*

*Orðt.18,10*

Annan jóladag fyri tíggju árum síðani floymdi ein stór flóðalda (ein tsunami) inn á strendnar í Tailandi og aðrastani í Fjareystri. Tá ið av fjaraði, vísti tað seg, at fólk í hundraðtúsunda-tali vóru druknað í hesi ræðuligu flóðalduni; hon gjørdi annars skaða so fjart haðani sum í Eystur Afrika. Nøkur sóu alduna langt burturi og skiltu, at havið kom við øgiligari megi. Tey, sum vóru stødd stutt frá einum sterkum húsum í fleiri hæddum ella eini høvd í landslagnum, skundaðu sær burtur av lágu, vandamiklu strondini.

Tað, sum hendi, gjørdist ein løgin og ítøkilig lýsing av einum orði í Bíbliuni: Guds frelsa í Jesusi Kristi er sum eini hús, ein borg ella ein skansi at leita sær skjól í, ella sum Skriftin so livandi ber tað fram: *Harrans navn er eitt sterkt torn, hagar flýggjar hin vísi og er vardur.*

## *Jesus – Guds offurlamb*

Einaferð var eingin synd, óndskapur, einki hatur, kríggj og ongar sjúkur á jørð. Alt var friður og semja. Men ein dagin smeyg slangan – hin óndi djevulin – sær inn í Edens urtagarð. Tá vendu menniskjuni sær burtur frá Gudi og fylgdu djevlinum, tá komu synd, sorg, sjúka og hatur inn í verðina. Men Gud elskaði verðina og vildi frelsa verðina og gera bót fyri menniskjuni, sum høvdu syndað. Tá sendi hann Jesus, sum gjørdist Guds offurlamb. Gud sendi ikki eina bók, eina religión, eitt ritual, tá ið hann skuldi frelsa verðina. Hann sendi ein mann – ein persón, Jesus, Guds son, sum gjørdist okkara staðgongumaður og tók á seg allar okkara syndir, sjúkur og revsing – so at vit sleppa undan. Av tí at hann tók okkara syndir, kunnu vit verða grødd.

*e.c. ums.*

# Sum skríggjandi hjørtur

Ein gomul kona hevur sagt mær hetta:

Eg var um 15 ár, og eg var farin á eitt sunnukvøldsmøti í gamla skúla í Hvalvík. Eg minnist tað, sum var tað í gjár. Skúlin var stúgvandi fullur, og eg stóð úti í gongini saman við øðrum. Tá reisir Agga seg upp at byrja møtið. Hann var ein so glaður kristin. Hann las úr Sálmi 42, vers 2: “Ligesom en Hjort skriger efter Vandstrømme, saa skriger min Sjæl til dig, o Gud!” Hann tosaði í Andans kraft, og eg sá alt so livandi fyri mær. Eg sá, hvussu hjørturin reisti høvur, og hornini sóust upp móti tí kláru luftini. Hann skríggjaði av tosta, og tað ekkóaði aftur í skógini. Einki er so ringt sum tosti. Hann er verri enn hungur. Hjørturin var frá sær sjálvum av tosta.

Nakrar dagar eftir fór Agga avstað við Fossanesi, og teir gingu burtur við mann og mús. Hetta var í 1938.

Agga var ikki lagstur á boðini, men vitnaði fyri sínum bygdarfólki, hvussu týdningarmikið tað er at lesa dagliga í Guds orði og at hava samband við Harran hvønn dag, annars torna vit upp innan.

Agga hevur helst havt eitt ánilsi, hvat ið mundi fara at henda, tí seinni segði lítli sonur hansara, at tá ið teir báðir gingu ein túr, segði pápin: “Tú kemur nokk ikki at síggja babba aftur.” Tá ið pápi Agga hoyrdi smádrongin siga hetta, svaraði hann:

“Segði hann eisini hatta við teg?”

*Effie Campbell.*

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 8.mai. | Tekstur: | Áps.1,6-11; | bíbliuorð: | Áps.1,8b |
| 15.mai. | Tekstur: | Jóh.16,5-15; | bíbliuorð: | Jóh.16,13a |
| 22.mai. | Tekstur: | Matt.14,22-34; | bíbliuorð: | Matt.14,27b |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74